

Stril Mariner við føroyskari manning heiðrað

# Frálandsskip við føroyskari manning viðurkenning

Deil:

**Jan Müller**

09.12.2014 - 13:39

Oljan.fo

Tann 26. november var ein stórur dagur umborð á frálandsskipinum Stril Mariner, sum hevur føroyska manning, er skrásett hjá FAS og er undir føroyskum flaggi.

Stril Mariner, ið bleiv bygt á Simek skipasmiðjuni í Noregi í 2009, hevur siglt uttan fráveruskaðar, síðani tað fór av bakkastokki tvs. í 5 ár. Tað merkir, at tey umborð

ongantíð hava havt nakran skaða ella nakra hending, sum hevur viðført sjúkramelding hjá nøkrum av manningini.

Hetta vildi reiðaríið heiðra skip og manning fyri á lítlari samkomu umborð. Umboð fyri BP/Talisman høvdu eisini leitað sær umborð, tí tey vildu eisini nýta høvið at heiðra manningina fyri skynsemi og dugnaskap, tá tað kemur til at minka oljunýtslu, útlát og at rapportera hendingar.

Stril Mariner hevur langtíðarsáttmála við BP/Talisman í Norðsjónum.

Ein av eigarunum og umboð fyri BP/Talisman hildu røðu og handaðu skiparanum gávur.

”Slíkar viðurkenningar fløva sjálvsagt umborð, men tær eru samstundis eisini ein viðurkenning til føroysk sjófólk sum heild. Tað er ein staðfesting um, at føroyingar gera sítt arbeiði til lítar, har teir eru,” sigur Jón Nónklett, yvirstýrimaður við oljan.fo.

Tað er Simon Møkster Shipping í Norra, sum eigur skipið, men tað er skrásett í FAS undir føroykum flaggi, og føroyingar manna tað. Tað er eitt dótturfelag hjá Tor Shipping í Havn, Team Bemanding, ið ger skipið út saman við fleiri øðrum Møksterskipum. Tilsamans eru tey 54 fólk, sum hava tilknýti til skipini og til tey bæði feløgini Tor Shipping og Team Bemanding, ið hevur skrivstovu í Havn. Stjóri er Hentzar Steingrímsson og nevndarformaður er Joan Torleivsdóttir.


Takk for flott innsats!